Fram-Mjølnir 1-3 (20-25, 17-25, 28-26, 24-26):

# Mjølnir vann silvurdystin

**Klaksvíkingar bastu føroyameistarunum úr Fram leygardagin, tá tað ikki gjørdist ordiliga spennandi fyrr enn móti endanum**

MANSFLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

ÍF, sum hevði frí hetta vikuskiftið, er framvegis oddalið og væl tað. Tvær ferðir so nógv stig sum næstu kappingarneytarnir hava fuglfirðingar vunnið sær, og eingin sær út til at hótta teir.

Tí var tað kanska heldur silvurið, ið dysturin í Hoyvíkshøllini leygardagin var ein forsmakkur uppá, enn ein kapping um gullið.

Mjølnir hevði fyrr í vetur vunnið 3-1 á Fram, og tað endurtóku klaksvíkingar sunnudagin í einum dysti, ið at byrja við sá út sum avgreiðsla, men gjørdist spennandi móti endanum.

Fyrstu tvey settini vann Mjølnir greitt, men í triðja setti svaraði Fram væl aftur og vann eftir javnbrótara.



*Eftir sigurin á Fram mugu menninir hjá Mjølnir nú takast sum einastu avbjóðararnir hjá oddaliðnum úr Fuglafirði*

Spenningurin helt sær eisini í fjórða setti, ið Fram byrjaði betur, men so kom Mjølnir fyri seg og vann tað og dystin eftir enn ein javnbrótara.

Sostatt vann Mjølnir seg fram um Fram á stigatalvuni, har bæði liðini hava seks stig – og eru seks stig aftan fyri oddaliðið ÍF.

Hesin munurin verður sjálvandi skerdur munandi, tá endaspælið byrjar, men ikki skerst kortini burtur, at skulu »silvur-aspirantarnir« úr Mjølni og Fram gera nakað við ÍF, skal spælast væl og kanska meira enn tað.

Fleyr-SÍ 0-3 (16-25, 15-25, 11-25):

# SÍ best í botninum

**Við sigrinum á Fleyr tópku sørvingar seg úr botninum á stigatalvuni**

MANSFLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Hóast SÍ longu er steypafinalistur, hevur annars einki borið til hjá sørvingum í ár. Saman við Fleyr hava teir ligið og rótað í botninum, og soleiðis er støðan partvíst eisini enn.

Tó fekk SÍ við greiðum sigri á Fram sunnudagin í Sørvági vunnið seg væl úr botninum og fram móti Mjølni og Fram, sum liggja tvey stig ovari. Tí munnu vónir enn vera um eina betri endastøðu, enn tað leingi hevur sæð út til.

Unga manningin hjá Fleyr, ið líkist »prügelknabe« í bestu mansdeildini í ár, fekk heldur einki gjørt hesa ferð við SÍ, sum vann settini við ávikavist níggju, tíggju og fjúrtan málum á muni.

Fleyr hevur neyvan tær heilt stóru vónirnar til hetta kappingarárið, nú so at siga alt liðið er skift út, meðan SÍ kanska ætlar sær at krúpa hægri. Skal tað bera til, skulu eisini aðrir dystir vinnast, enn teir móti Fleyr, og so fæst at síggja í endaspælinum, um sørvingar kanska fáa fatur á Mjølnir og Fram.

# Fjórðingsfinalurnar í hondbólti klárar

**Lutakast hevur verið í steypakappingini hjá kvinnum og monnum, har seks av átta dystum eru beinleiðis uppgerðir millum 1. deildarlið**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Steypakappingin í hondbólti er nú komin so mikið langt, at Hondbóltssamband Føroya hevur havt lutakast um, hvussu spælast skal í fjórðingsfinalunum í Coca-Cola kappingini.

Hjá kvinnum eru dystirnir VÍF I-Tjaldur I, VB I-Kyndil I, STÍF II-Stjørnan I og Neistin I-StÍF I, og hjá monnum StÍF I-Tjaldur I, KÍF I-Kyndil I, KÍF III-Neistin I og VÍF I-H71 I.

Sum sæst, eru tað bara kvinnuliðið hjá StÍF í 2. deild og mansliðið hjá KÍF í 3. deild, sum ikki eru 1. deildarlið, so nakrar spennandi uppgerðir kunnu væntast standa fyri framman.

Serliga er tað hjá kvinnunum, at kanska ber til at vænta sær nógv av dystunum VB-Kyndil og Neistin-StÍF, tí hesi fýra teljast millum teirra, ið royna at gera vart við seg í landskappingini eisini.

Hjá monnunum sær tað kanska ikki so spennandi út, men havandi í huga, at landskappingin hevur havt fleiri óvæntað úrslit, kunnu kanka serliga dystirnir StÍF-Tjaldur og KÍF-Kyndil vera áhugaverdir.

Nú grundspælið í landskappingini nærkast endanum, er dystarskráin trong hjá flestu liðum, so tí kann roknast við, at flestu av fjórðingsfinalunum verða spældar mitt í viku.

Hondbóltssambandið hevur boðað feløgunum frá, at fjórðingsfinalurnar skulu verða spældar áðrenn sunnudagin 22. desember.

Síðsta kappingarár vann VÍF kvinnufinaluna og StÍF mansfinaluna.

Fleyr-Dráttur 2-3 (16-25, 25-22, 17-25, 25-20, 12-15):

# Kundi farið báðar vegir

**Fimm sett máttu til, áðrenn Dráttur kundi kalla seg vinnara av dystinum móti Fleyr, ið royndi seg við nýggjum venjara**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Mest spennandi dysturin um vikuskiftið var uttan iva tann sunnudagin í Gundadalshøllini millum kvinnurnar hjá Fleyr og Drátti.

Fleyr hevði brúk fyri at prógva nakað, eftirsum liðið vikuna frammanundan var tað fyrsta, ið hevði tapt móti KÍF, umframt at byrjanin yvirhøvur hevur verið vánalig í vetur.

Hetta var somuleiðis fyrsti dysturin við donsku Mette Oht sum venjara, og tí skuldu Fleyr-kvinnurnar eisini yvir fyri nýggja venjaranum prógva, at dugur var í teimum.

Samstundis skuldi Dráttur halda fast um góðu gongdina, sum í dystinum frammanundan hevði merkt sigur á ÍF, sum er ein av FM-favorittunum í vetur.

At bæði liðini eisini royndu at prógva alla sína styrki, fekst sjón fyri søgn. Settini skiftu millum partarnar, og ikki fyrr enn í evstu løtu varð vinnarin funnin, tá Dráttur í fimta setti dró longra stráið og vann 15-12.

Hóast Dráttur á pappírinum skuldi verið sterkara liðið og eisini vann, so hevur sigurin vissuliga nógv at siga fyri vágakvinnurnar, ið hava fingið fatur á rætta endanum.

Dráttur hevur nú átta stig, og er tvey stig aftan fyri Mjølnir og fýra stig aftan fyri ÍF og TB. Fleyr er við sínum tveimum stigum framvegis botnlið saman við KÍF, men hesin fimmsettarin móti Drátti kundi givið ábendingar um, at vend er við at koma í.

KÍF-Mjølnir 0-3 (14-25, 5-25, 11-25):

# Mjølnir ov stórur biti hjá KÍF

**Kollafjarðarkvinnur, sum fyri viku síðani vunnu fyri fyrstu ferð, fingu ein frammaná frá Mjølni leygardagin**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Liðið hjá KÍF, sum er nýtt í meistaradeildini hjá kvinnum, var orsøk til ikki so lítið síðsta vikuskiftið, tá tað eydnaðist at vinna síni fyrstu stig nakrantíð við 3-0 sigri á Fleyr.

Eftir tann dystin varð venjarin hjá Fleyr koyrdur frá, so hesin fyrsti sigurin hjá kollafjarðarkvinnum fekk størri avleiðingar, enn mangir aðrir sigrar hava fingið tað.

Leygardagin var tað so upp til KÍF at royna eina endurtøku í Hoyvíkshøllini, hóast uppgávan í útgangsstøðinum mundi vera munandi torførari. Og tað vísti hon seg eisini at vera.

Mjølnir, ið hevur nógv tað royndasta liðið av øllum í bestu kvinnudeildini, læt ongantíð KÍF fáa fótin fyri seg, og vann ein sannførandi 3-0 sigur. Serliga í øðrum setti, tá KÍF bara vann fimm bóltar, var munurin stórur.

KÍF var ein skuggi av sær sjálvum, samanborið við dystin móti Fleyr, og tí gjørdist tað kanska eisini í so lætt spæl hjá Mjølnir. Samanlagt yvir allan dystin vóru tær úr Mjølni omaná í øllum lutum, og sigurin var væl og virðiliga uppiborin.

Hjá klaksvíkskvinnum var hetta ein dystur, ið skuldi vinnast, eftir at Mjølnir vikuna frammanundan hevði tapt tepur móti oddaliðnum TB. Hetta eydnaðist, og Mjølnir er framvegis við í oddastríðnum í meistaradeildini, bara tvey stig aftan fyri oddaliðini ÍF og TB.

KÍF stríðist hinvegin framvegis í botninum saman við Fleyr, og hava tey bæði liðini tvey stig í part.




TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

**Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir lærarar**

**Lærari til el-deildina**
Starvio, sum er eitt **fulltíoarstarv**, umfatar undirvísing á el-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkio. Neyougt er at umsøkjarin hevur hollan kunnleika til PLC. Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøoi, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

*Á el-deildini starvast 4 lærarar í føstum starvi, 1 tímalærari og 1 verkstaoarhjálpari. Næmingarnir læra til elektrikara og ganga í skúla í 55 vikur tilsamans.*

**Lærari til timburdeildina**
Starvio, sum er eitt **fulltíoarstarv**, umfatar undirvísing á timbur- og snikkaradeildunum.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum húsasmiour, og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkio. Umsøkjarar vio hægri útbúgving hava fyrimun.

*Timbur- og snikkaradeildinar eru í sama bygningi. Lærarnir skifta ímillum báoar deildirnar.*
*Á deildini starvast 5 lærarar í føstum starvi, 1 tímalærari og 1 verkstaoarhjálpari. Næmingarnir læra til húsasmio ella bygningssnikkara og ganga í skúla ávikavist 45 og 50 vikur tilsamans.*

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verca roknao sum royndartío, har tann, sum verour settur í fast starv, má vera til reioar at taka ta eftirútbúgving, tao verour seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aora førleikagevandi útbúgving, sum er neyoug fyri at verca settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verour sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Størvini skulu setast 6. jan 2003.

Skrivlig umsókn vio upplýsingum um útbúgving, viomælum og starvstío skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 12. des. 2002

Meira fæst at vita um størvini vio at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 · 100 Tórshavn
Tel. 311957 · Fax 316621
e-postur: tst@tst.fo · www.tst.fo



HYGG HER

Ivan Johansen Bilar www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Saxo 1,5D 3h
km 35.000 Jan'01
108.000,-

Citroen ZX 1,9TD 5h
km 163.000 Mai'97
85.000,-

Citroen Xsara 2,0I Limite week.
km 28.000 Apr'99
128.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDI
km 95.000 Nov'99
130.000,-

Daewoo Legance 2,0I
km 17.000 Okt'98
119.000,-

Hyundai Atos 1,0I
km 22.000 Apr'01
77.000,-

Chrystler Voyager 2,4I
km 82.000 1998
115.000,-

Mitsubishi Galant 1,8 GLSI 4h
km 187.000 Juni'95
35.000,-

VØRUVOGNAR

Citroen Jumper 2,5TD
km 120.000 1998
120.000,-

Nissan Serena 2,3D
km 89.000 Mai'97
92.000,-

Toyota Hi-Lux
km 95.000 Jun'94
110.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar www.ivan.fo





**Stjóri til Berg Motors**

Berg Motors er eitt felag við stórum virksemi, og hevur gjøgnum mong ár verið ímillum størstu og mest viðurkendu bilasølur og -verkstøð og bilútleigarar (Avis) her á landi.

Men vit eru ikki nøgdir við bert at sammeta okkum við heimamarknaðin. Vit hava sett okkum sum mál ein nýggjan føroyskan standard, fult á hædd við altjóða krøv innan bilbransjuna, og tað verður tín uppgáva at lyfta virkið upp á hetta stig. Eitt av málunum á leiðini er ein ISO-góðkenning.

*Berg Motors hevur umboðað Mazda bilar í Føroyum síðani 1968 og síðani 1979 eisini Scania. Umframt at selja bilar hava vit bilverkstað og átaka okkum umvæling av bilum. Vit hava altíð lagt okkum eftir, at tað skal vera lættari hjá kundum okkara at fáa eykalutir og hava tí eina stóra og væl skipaða eykalutagoymslu. Berg Motors hevur eisini dekksølu og bilútleigan (Avis). Hjá Berg Motors starvast 18 fólk, harav nakur hava verið í starvi í meira enn 20 ár. Berg Motors er ein sterk og sunn fyritøka, sum í 2001 hevði ein umsetning uppá 48 mió kr.*

**Starvið**
Stjórin fær ábyrgdina av dagliga rakstrinum í øllum deildum, og hann skal standa fyri støðugt at menna, skipa og útbyggja virksemi á øllum økjum. Umboðanin av Scania og Mazda krevur, at av og á er neyðugt at ferðast til Danmarkar og onnur lond.

**Umsøkjarin**
Stjórin má hava eina fakliga bakgrund, ið gevur innlit í handil, búskap og fyrisiting. Hóskandi útbúgving og royndir eru tí ein fyritreyt.
Tú mást vera framskygdur, miðvísur í at røkka tey mál, tú setur tær, duga at samstarva við onnur og evna at motivera starvsfólkið.

Góð løn verður boðin eftir avtalu og samsvarandi førleika. Starvið skal setast skjótast til ber, men bíðast kann eftir tí rætta persóninum.

Umsókn við prógvum og CV skal sendast til P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, sum eisini kann geva nærri upplýsingar.
Umsóknafreistin er 01.01.2003.

RASMUSSEN & WEIHE
An associated firm of PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
Reg. nr. 267 · E-mail: rasmussen@rasmussen.fo · http://www.rasmussen.fo








www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Sosialurin